ATLANTIC AIRWAYS
SUMMARKAPPINGIN '09

**Stóra summarkappingin hjá Sosialinum**

Send inn og vinn nógvar flottar vinningar

Vika 24:
Leiðin til Billund

8 síður við spennandi tilfari um summar



# Stóri **Føroya-vinurin** í Billund

**Steffen Riiskjær brennur fyri, at fleiri danir skulu síggja Føroyar, og at fleiri føroyingar síggja møguleikarnir í Billund**

**BILLUND**

Atlantic Airways hevur eisini sín mann í Billund. Stefen Riiskjær er væl kendur í Føroyum. Hann hevur verið óteljandi ferðir í Føroyum, og hevur knýtt mong vinarbond og sambond við her á landi. – Mín fremsta uppgáva er at útvega ferðafólk av Fjóni og úr Jútlandi til Føroya, men eg havi eisini eina stóra uppgávu við at taka mær komum og fráferðum, ikki minst um tað føroyska veðrið argar. Eg eri sera fegin um mítt arbeiðið, og eg beri stóran alsk til Føroyar, sigur Steffen avgjørdur.

### Løtt Floghavn

Steffen kom fyrstu ferð til Føroya í januar í 1992. Tá var hann í starvi hjá Mærsk Air. Tá Mærsk gavst at flúgva til Føroya, kom Steffen í starv hjá Atlantic Airways. – Vit gera nógv fyri at stimulera áhugan fyri Føroyum í Jútlandi og á Fjóni. Sjálvandi eru vánirnar ikki tær bestu í ár, men vit trúgva uppá tað, og vit gera alt hvat vit kunnu fyri at opna eyguni hjá fólki fyri Føroyum. Steffen heldur, at nógvir føroyingar yvirsíggja fyrimunirnar við at lenda í Billund. Føroyingar yvirsíggja eisini, at tað ber til at flúgva til onnur lond frá Billund. – Føroyingar yvirsíggja eisini, at vit hava eitt gott flogvallarhotel, bara 500 metrar frá flogvøllinum. Vit hava eisini Legoland og Lalandia, so eg vóni og trúgvi, at vit í komandi tíðum koma at síggja enn fleiri føroyingar her í Billund. Bert fýra tímar aftaná ein er farin heimanifrá, so kann ein sita í einum leigaðum húsum hjá Lalandia. Eg tosi ofta við føroysk ferðafólk, sum siga, at tað er so deiliga lætt at skifta flogfar her í Billund. Frástøðan er ikki so stór, flogvøllurin er ljósur og góður, og starvsfólkini eru vinarlig. Spurdur um hvat hann ger, fyri at vekja áhugan fyri Føroyum, sigur Steffen, at hann tekur fólk sum starvast í ferðavinnuni til Føroya. Eg havi ikki havt nakran við mær til Føroya, sum ikki hevur verið bergtikin og glaður fyri at vitja oyggjarnar. Steffen heldur, at herferðin við www.ferieoerne.dk hevur hjálpt væl, tá tað kemur til at branda Føroyar. Humorur fangar væl í Danmark. – Tað er møguligt, at herferðin ikki fer at geva so nógv beinavegin, við teimum fíggjarvánunum, sum eru nú, men fólk hava lagt merki til filmin, og tað fer við tíðini uttan iva at geva úrslit.


Melda teg til Club Atlantic og

VINN FERÐASEÐLAR



og fá sertilboð sendandi við telduposti

Øll, sum tekna seg, eru við í lutakasti hvønn mánað um eina ferð aftur og fram á rutunetinum hjá Atlantic Airways.

Melda til á: www.atlantic.fo

Tel 34 10 00

ATLANTIC AIRWAYS

atlantic.fo